## Liðugt arbeiði

**Tað ráddi um at gera arbeiðið, og hetta eydnaðist. Tað tóktist vera niðurstøðan hjá fronsku stjørnunum, sum nú fyrireika seg til dystin í Dublin mikudagin**

FRAKLAND
*Jákup Mørk/*
*Álvur Haraldsen*

Lens, Frakland: Undan dystinum vóru boðini frá franska landsliðsvenjaranum, Raymond Domenech, greið. Trý stig skuldu vinnast, og so ráddi um at sleppa til Írlands uttan skaðar ella leikbann.

Og tá hetta eydnaðist, var tað stórt sæð ein væl nøgdur venjari, sum riðiling av fjølmiðlafólki fekk orðið á eftir dystin.

- Tað vóru stigini, sum høvdu størsta týdningin, og tey fingu vit. Eg haldi eisini, at vit høvdu tamarhald á dystinum. Men í Írlandi hava vit neyvan ráð at brenna so nógvar møguleikar, helt venjarin.

Hann rósti annars spælarunum fyri at fylgja taktiska upplegginum, soleiðis at teir alla tíðina spældu bóltin skjótt runt, fyri at á tann hátt at opna og møða føroyska liðið.

Og liðformaðurin, Zidane, sum fór av vøllinum stutt inn í seinna hálvleik, var sum so púrasta samdur.

- Eg haldi, at vit spældu nógv betri fyri steðgin, men 3-0 er eitt fínt úrslit. Men vit skulu øll vera púrasta greið um, at uppgávan í Dublin verður nakað nógv truplari.



*Fokus í franska hópinum varð vent móti Dublin, so skjótt sum uppgávan móti Føroyum varð av. Ein uppgáva, sum bæði venjari og liðforamaður hildu varð loyst nøktandi*

# Klassamunur

**Føroyski landsliðsvenjarin kundi illa staðfesta annað, enn at mótstøðan hjá føroyska liðnum hevði verið so nógv størri, enn hon nakran tíð hevur verið**

VENJARIN
*Jákup Mørk*



*Henrik Larsen helt, at fronsku stjørnurnar prógvaðu, hvør munurin er millum spælarar, sum forvinna einar 50-60 milliónir um árið og so teimum føroysku*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Lens, Frakland:** Tað var ein heldur avkláraður Henrik Larsen, sum á tíðindafundinum kom móti føroysku miðlunum, meðan Zidane og hinar stjørnurnar vóru andlitini, sum restin av tíðindafólkunum savnaðust um.

- Har vóru nokk einir tveir ella tríggir klassar á muni í spælinum. Vit gera alt tað, sum vit eru mentir, men tað munar bara ikki stórvegis. Teir hava eitt lið í heimsflokki við skjótleika og tekniskum førleika, sum bara kanst hyggja at. So eitt tap upp á 3-0 kunnu vit ikki klaga um, helt Henrik.

- Vit royna so eisini at vera við í dystinum, og vit hava okkurt skotið og onkran stútara, suk hótta teirra mál, men munurin var tó alla tíðina sjónligur. Hatta eru jú spælarar, sum koma úr størstu liðunum úr Europa, og tað er nokk ein orsøk til, at teir forvinna hasara 50-60 milliónirnar um árið.

Mest óvæntaði parturin av føroysku uppstillingini mundi vera, at Ingi Højsted hesaferð fekk pláss millum teir fyrstu ellivu. Ein avgerð, sum Henrik tó ikki sjálvur helt vera so løgin.

- Ingi hevur gjørt tað gott í langa tíð. Bæði undir venjingum og í teimum dystum, sum eg havi sæð hann spælt. Móti Kypros var tað tó óheppið, at vit fingu tveir skaðar, soleiðis at útskiftingarmøguleikarnir vórðu avmarkaðir. Men eg haldi heilt avgjørt, at hann í dag vísir, at hann er ein spælari, sum vit kunnu vænta okkum nógv av framyvir.

### Eingi kort

Merkisvert við dystinum var annars, at hvørki av liðunum fekk eitt einasta gult kort frá dómaranum. Tað kundi bent á, at føroyingarnir kanska vóru dekan av imponeraðir av mótstøðuni, soleiðis at teir ikki komu í vanliga nógvu nærdystirnar, men hesum var Henrik Larsen als ikki samdur í.

- Snøgt sagt, so megna vit ongantíð at koma fram til nærdystirnar, hóast vit royna. Teir spæla somikið skjótt, at teir alla tíðina eru tvey fet framman fyri okkum, og so kanst tú ikki so mikið sum gera eitt fríspark. Munurin var stutt sagt ov stórur, og so kundi tað gera tað sama, hvussu okkara royndu. Eisini hóast eg eri nøgdur um avrikið hjá hvørjum tí einasta spælara. Eg haldi í øllum førum, at tað vildi verið at kravt alt ov nógv av teimum, um vit siga, at teir skulu spæla upp móti hasum liðnum.

### Ein heilt annar dystur

Mikudagin verður tað Ísrael, sum er mótstøðuliðið, og hóast talan tá eisini er um eitt lið, sum enn hevur møguleikan at koma til HM-endaspælið, so ivast venjarin ikki í, at talan tá verður um øðrvísi dyst.

- Vit eru so longu farin í holt við fyrireikingarnar tann vegin. Spælararnir fáa nú mat og drekka, so orkudepotini kunnu fyllast, og so skulu vit eisini fokusera tankarnar tann vegin. Tað er so ein heilt onnur uppgáva, har vit hava heimavøll. Og hóast teir aftur í kvøld fingu eitt gott úrslit, og tí skulu vinna dystin móti okkum, so er ætlanin í øllum førum at arga teir eitt sindur, staðfesti Henrik Larsen at enda.

# Ein stór uppliving

**Lens, Frakland:** - Teir vóru ótrúliga góðir. Tað er tað nokk eingin, sum er ósamdur við mær í.

Soleiðis var fyrsta viðmerkingin, tá vit eftir dystin spurdu føroyska liðskiparan, Óla Johannesen, um, hvussu hann hevði upplivað dystin. Og hann stafðesti eisini, at teir høvdu kent seg illa sperdar í føroysku miðverjuni, sum mest sum allan dystin var offur fyri einum støðugum fronskum álopsspæli.

- Ja, heilt sikkurt. Eg haldi sjálvur, at vit gjørdu alt tað, sum vit vóru mentir, og úrslitið kundi í sjálvum sær verið nógv verri. 3-0 er kanska væl sloppið í so máta.

Skal tosast um føroyska verjupartin, so slepst ikki undan at nevna off-side felluna, sum so ofta steðgaði fronsku álopinum. Men Óli helt ikki, at hetta var nakað, sum teir høvdu lagt serligan dent á undan dystinum.

- Tað er partur av spælinum, sum vit vanliga royna at spæla, og tað riggaði eisini fleiri ferðir í kvøld. Hinvegin kiksaði hon við triðja málið hjá teimum, so heilt perfekt var tað ikki. Tað er eisini fyri… trupult at halda nøkrum so góðum spælarum burtur frá møguleikum allan dystin, men sum sagt, so haldi eg, at vit kunnu ikki vera annað enn nøgdir.

Og eins og venjarin, so helt Óli Johannesen ikki, at kort-leysi dysturin var ein mátistokkur fyri, at føroysku spælararnir ikki góvu seg nóg nógv í nærdystunum.

- Teir vóru snøgt sagt so ófatuliga skjótir. Sjálvur royndi eg ta einu ferðina at steðga Henry, tá hann breyt ígjøgnum, og sjálvt um eg helt meg hava gjørt fríspark, so helt hann bara fram, sum var einki hent. Vit komu snagt ikki nóg nær spælarunum, áðrenn teir antin høvdu spælt bóltin víðari, ella bara høvdu snýtt okkum. Hatta var snøgt sagt eitt lið í heimsflokki, og so var ikki so nógv meira hjá okkum at gera.

Alt í alt helt Óli eisini, at teir bara kundu njóta upplivingina, sum hetta hevði verið, og at føroyska liðið ikki hevði nakað at skammast um.

- Men verður tikið samanum, so haldi eg ikki, at vit skulu klaga. Vit gjørdu okkara besta, og nógv meira enn tað kanst tú illa krevja. Onkur kundi kanska spælt betri og sjálvur helt eg, at mítt avrik var ikki meira enn miðal. Men hinvegin, so kundi tað eisini verið verri, og alt í alt, so haldi eg, at allir góvu tað, sum teir vóru mentir

**-mørk**



*Óli Johannesen hevði ikki stórt annað at viðmerkja, enn at føroyska liðið hesa ferð hevði spælt móti nøkrum heimsstjørnum, sum eisini megnaðu at vísa hetta í verki*
*Mynd: Álvur Haraldsen*